*Reiðarar og fiskimenn troyttast av politikkinum hjá landsstýrinum:*

# Spurningurin er um vit skulu kasta frá okkum

*– Vit hvørki orka ella tíma at stríðast meiri. So tá ið avgerðin er fallin, fari eg at at umhugsa støðuna, og so kann tað væl henda, at eg komi bara til ta niðurstøðu, at tað er frægast at sigur Jósup Henriksen, sum er formaður í felagnum hjá lemmatrolarunum*



*– Lemmatrolararnir hava mestsum sligið seg til tols við, at nú skulu teir bíða eftir úrslitinum, og so taka teir avleiðingarnar aftaná. Og tað kann væl vera, at niðurstøðan verður, at tað er frægast bara at gevast heilt, tí hetta er blivið ov møtimikið, sigur Jósup Henriksen, formaður í felagnum hjá lemmatrolarunum*

Áki Bertholdsen

–Hetta er blivið so troyttandi, og so møtimikið, at spurningurin er, um vit ikki bara fara at blaka frá okkum.

Jósup Henriksen, formaður í felagnum fyri lemmatrolarar, er so uppøstur av fiskivinnupolitikkinum hjá sitandi landsstýrið, at hann sigur, at nú er tað blivið ein spurningur um teir skulu gevast ella ikki.

ar so dyggiliga, at tað er evna til av fólki, sum førir fiskivinnupolitikk á einum skrivaraborði, uttan at hava minstu hóming av, hvat tað ber í sær at fiska undir Føroyum.

Landsstýrið ætlar, at teir minnu lemmatrolararnar skulu fáa 100 fiskidagar á innaru leiðum og teir størru trolararnir skulu fáa 80 dagar. Men hvør dagur á innaru leiðum kunnu býtast um við fýra dagar á ytru leið.

– Bara hetta vísir betri enn nakað annað, hvussu illa umhugsað uppskotið hjá landsstýrinum er, tí sjálvandi skuldu teir teir størru trolararnir havt fleiri fiski døgum enn teir smærru, tí teir eru meiri úti.

### Troyttast inn at sálini

Jósup Henriksen sigur, at tað eru nú trý ár síðani, at ætlanin tók seg upp at fáa lemmatrolararnar upp í fiskidagaskipanina - við so fáum døgum sum gjørligt.

– Síðani hevur hetta ligið og hótt okkum hvørt ár, og nú er tað farið at troytta okkum inn at sálini.

–Spurningurin er, um vit ikki nú eru komin har til, at tað er longst sum best bara at kasta frá sær.

–Vit tíma ikki at ferðast til Havnar á fund í tíð og úrtíð á fundir við stovnar og nevndir um at fáa loyvi at fiska.

–Er ætlanin at fáa lemmatrolararnar burtur, er tað ongin trupulleiki, tí so fara teir burtur.

– Tað hevur ongan týdning fyri okkum sjálvar, tí vit skulu nokk fáa kans onkustaðni- um ikki annað, so við onkrum útlendskum skipi.

–Men teir, sum halda, at fíggjarliga úrslitið, hjá skipunum, sum verður eftir, fer at batna, um helvtin av flotanum fer burturúr, teir hava ikki skil fyri fiskiskapi.

Jósup Henriksen sigur, at allir, sum fiska, teir vita, at fiskurin undir Føroyum stendur so spjaddur, og flytir seg so nógv, at tað krevur stór orka at fáa hann til høldar.

– Í Barentshavinum kundu vit liggja í vikur á sama stað og fiska, uttan at flyta okkum meir enn ein fjórðing hendaveg ella handaveg.

–Men undir Føroyum eru tað hitabroytingar, og onnur viðurskifti, sum gera, at fiskurin stendur ongantíð í stað og bátarnir mugu flyta seg tíma fyri tíma.

Formaðurin í felagnum fyri lemmatrolarum vísir eisini á, at teir fiska fisk, sum annars ikki kemur til høldar.

– Men verður flotin av lemmatroalrum skerdur, so kann tann fiskurin verða meiri til týskarar og aðrar at fiska fyri okkum, heldur Jósup Henriksen speiskliga fyri.

Hann vísir eisini á, at tað er trupult hjá lemmatrolarunum at býta fiskidagarnar sundur í innaru og ytru leiðir, tí tað er so ofta, at teir noyðast eitt sindur inn um ringin eftir upsa og kongafiski, tá ið hesin flytir seg.

Hann leggur afturat, at fara lemmatrolarar burturúr flotanum, verður tað ein vanlukka fyri tey øki í landinum, sum teir eru knýttir til, eitt nú fyri Suðuroynna og fyri Vágoynna.

### Bíða eftir úrslitinum

Jósup Henriksen sigur, at hann heldur, at teir, sum eiga lemmatrolararnar, eru nú komnir til ta niðurstøðu, at tað er ein politisk avgerð, at trolararnir skulu upp í fiskidagaskipanina og at tað nyttar lítið at stríðast ímóti.

– Vit eru farin at troyttast av at hava hetta hangandi yvir høvdinum á okkum ár eftir ár. Tí ætla vit at royna at fáa sum frægast burturúr.

–Vit eru komnir til tað niðurstøðu, at nú skulu vit bíða eftir úrslitinum, og so taka vit avleiðingarnar aftaná.

–Eg sigi fyri meg, at tá ið úrslitið fyriliggur, fari eg at at umhugsa støðuna, um vit skulu gevast, ella um vit skulu halda á.

Og tað kann væl vera, at eg komi til ta niðurstøðu, at tað loysir seg ikki at blíva við.

# Vilja hava 1600 fiskidagar

Áki Bertholdsen

Lemmatrolararnir koma ikki at klára seg við tí uppskotinum, sum landsstýrið hevur lagt fram.

Tað sigur Jósup Henriksen, formaður í felagnum fyri lemmatrolarar.

Eftir ætlanini hjá landsstýrinum skulu teir minnu lemmatrolararnir, teir við minni motori enn 2100 hestum, fáa 100 fiskidagar á innaru leiðum.

Teir størru trolararnir skulu fáa 80 dagar á innaru leiðum. Men hvør dagur skal kunna býtast um við fýra dagar á ytru leiðum.

Hetta vilja lemmatrolararnir ikki góðtaka uttan víðari.

Felagið fyri lemmatrolararnar hevur nú skrivað landsstýrinum eitt mótmæli ímóti ætlanini at fáa teir upp í fiskidagaskipanina.

Felagið hevur eisini biðið um fund við vinnunevndina hjá løgtinginum, sum nú fer at viðgerða uppskotið um fiskidagaskipan.

Felagið hjá lemmatrolarunum sigur, at skotbráið at viðgerða eitt so stórt og kollveltandi mál fyri lemmatrolararnar, er ógvuliga stutt, tí hetta er at fara undir eina heilt nýggja skipan.

Men grundað á á tey søguligu rættindini hjá lemmatrolarunum, skjýtur felagið hjá teimum upp, at teir størru trolararnir fáa 96 dagar á innaru leiðum, men at hvør dagur skal kunna býtast við fimm dagar á ytru leiðum.

Hinvegin skjýtur felagið upp, at teir størru trolararnir fáa 120 dagar á innaru leiðunum, men at hvør dagur hjá teimum kann býtast við fýra dagar á ytru leiðunum.

Felagið sigur, at hetta gevur 1600 dagar á innaru leiðum.



*Skotbráið at viðgerða eina so kollveltandi skipan er ov stutt, heldur felagið hjá lemmatrolarunum.*



# Jazzfestivalurin er á gáttini

*Tann árligi Jazz- Fólka- og Bluesfestivalurin, tann seytjandi í røðini, verður blástur ígongd mitt í komandi viku*

Rúnar Reistrup

Í fýra dagar verður Norðurlandahúsið ein tónleikamiðstøð, har kend og minni kend nøvn undirhalda føroyingum og útlendingum við jazzi, gospel, tango, blues, rock og fólkatónleiki. Tað er tann 17. Tórshavnar Jazz- Fólka- og Bluesfestivalurin sum setir húsið á annan enda frá mikudegnum 9. august til leygarkvøldið 12.

Høvuðskvøldið á Jazzfestivalinum plagar at vera leygarkvøld, og tað er eisini har, at fyrireikararnir hava sett tey bæði kendastu útlendsku nøvnini á skránna. Talan er um argentiska/týska tangobólkin »Coco Nelegatti y su Quinteto Arrabal« og donsku songkvinnuna Lis Sørensen.

Men fríggjakvøldið, ið traditionelt hevur verið førsørt spennandi.

### Jazzutur Bach

Annars byrjar Jazzfestivalurin mikukvøldið við einari heiðran av J. S. Bach, tá Jóhannes Andreassen og Stamen Stantshev seta seg við hvør sítt flygel og spæla eina klassiska og eina meira jazzuta útgávu av tónleikinum hjá Bach samstundis. Talan verður sostatt um eitt slag av samansmeltan millum barokkin og jazzin. Handan klassiska flyglið situr Jóhannes, meðan Stamen situr aftanfyri tað jazzuta.

Í Klingruni hetta mikukvøldið verður helst best umtókta songkvinnan í Føroyum í løtuni, Eivør Pálsdóttir og bólkurin Ivory. Afturat sær hava tey víðagitna saxofonistin John Purcell.

Íslendski bólkurin »Hallas Travel« endar mikukvøldið á Jazzfestivalinum. Talan er um ein bólk, ið ger annað og meir enn bara spælir. Teir fýra tónleikararnir í bólkinum hava drúgvar royndir innan tónleik, og onkur teirra er eisini sjónleikari. Sjálvir kalla teir seg fyri »tónleikasjónleikarar«.

### Armstrong í útnorði

Hóskvøldið byrjar við einum samansettum bólki úr teimum trimum londunum í útnorði umframt Danmark. Teir tveir grønlendingarnir, tveir íslendingar, tveir danir og ein føroyingur hava eitt lítið seminar í Føroyum í døgunum upp undir Jazzfestivalin, og sum eitt slag av endabresti fara teir at spæla í ein hálvan tíma ella so í Norðurlandahúsinum.

Føroyingurin í hópinum er eingin annar enn sjálvur høvuðsfyriskiparin av Jazzfestivalinum, Brandur Øssursson, og løgini, bólkurin fer at spæla, verða góð klassisk løg hjá Louis Armstrong.

Fyrsti bólkur í konsertsalinum hóskvøldið verður danska bigbandið »Swinging Link« úr býnum Hjørring. Talan er um eitt øðrvísi bigband, ið millum annað nýtir ljómborð at styðja tónleikin við.

Hóskvøldið endar við »Stavanger Gospel Choir«, sum fyrireikararnir vænta fer at draga nóg nógvar áskoðarar til at konsertsalurin verður fullsettur hetta kvøldið.

Norðmenn eru tiltiknir fyri síni góðu gospel kór, og »Stavanger Gospel Choir« sigst vera ein av orsøkunum til tess.

### Jassarnir fast inventar

Í fastivalskránni síggjast tvey nøvn ganga aftur fleiri dagar. Talan er um »Jassararnar« og »Trevor Hunter Folk Duo«, sum spæla í ávikavist forhøllini og musik-cafeini trý av kvøldunum.

Trevor Hunter er fiólleikari í Hetlandi, har hann dagliga arbeiðir sum musikskúlalærari.

»Jassarnir« eru unga ættarliðið innan føroyskan jazztónleik. Teir hava í fleiri ár verið fast invenatar á Jazzfestivalinum, har teir plaga at syrgja fyri einum lættum huglagi í forhøllini. Brandur Øssursson tók fyri sjey árum síðan stig til at savna blaðungar tónleikarar saman í bigbandið »Jassarnar« og tað er framvegis hann, ið venur og stjórnar teimum. Hesir blaðungu tónleikararnir eru blivnir nakað eldri, síðan teir fyrstu ferð vóru á palli, men fleiri av teimum eru við enn. »Jassarnir« blása fyrsta tónan á 17. Tórshavnar Jazz- Fólka- og Bluesfestivalinum.

Forsølan av atgongumerkjum byrjaði í farnu viku, men enn eru pláss eftir til øll kvøldini.

Í fjør vórðu serliga atgongumerkini til leygarkvøldið útseld langt frammanundan, so tað loysir seg neyvan at bíða ov leingi við at bíleggja pláss.



*Íslendski bólkurin »Hallas Travel« ella ferðin hjá Hallu, sum navnið merkir, spælir tónleik og sjónleik alt í einum. Bólkurin fer á pallin fyrsta kvøldið á Jazzfestivalinum.*



*Tann argentinski/týski bólkurin „Coco Nelegatti y su Quinteto Arrabal" fer at spreiða tangotónar í Norðurlandahúsinum leygakvøldið 12. august.*

oyska kvøldið á festivalinum, fer helst einki at standa aftan fyri leygarkvøldið.

Fríggjakvøldið endar við bólkinum »Lost Pilgrims« við tí sum kemur næst einari føroyskari tónleikaguru, nevniliga Jørgen Dahl, á odda.

Klaksvíkingurin, sum hevur givið føroyskum tónleikarum nakað at hugsa um, síðan hann í sínum ungu døgum stóð fremst á palli saman við »Straight Ahead«, hevur ikki verið at hoyrt í Føroyum í ógvuliga nógv ár. Tí er ikki sørt av spenningi í luftini fríggjakvøldið, tá Jørgen Dahl vendir aftur.

Undan »Lost Pilgrims« verður ein minst líka áhugaverdur bólkur á palli. Bólkurin er »Green Gate«. Manningin í »Green Gate« er fyri ein stóran part gomul manning úr bólkinum »Plüm«, so hendan framførslan verður eisini ein afturlítan á gamlar dagar. Hetta verður tó bert galdandi fyri sjálvar tónleikararnar, tí tónleikurin hjá bólkinum er nýggjur og ikki


## Starvsfólk til Føroya Tele

SANSIR · TEL 355 355

**Internet Support**

Hevur tú hug at arbeiða innan eitt øki í støðugari menning og við nógvum avbjóðingum, har vit leggja stóran dent á at vera fremst innan hesa tøkni í Føroyum, ert tú møguliga rætti persónurin at starvast á okkara deild.

Sum høvuðsuppgávu fært tú ábyrgd av at stovna nýggjar kundar umframt support og viðlíkahald av teimum kundum, sum vit longu hava.

Vit bjóða sera áhugaverdar arbeiðsumstøður á Internet-deildini á Føroya Tele, har uppgávurnar m.a. eru:

- at veita viðskiftafólki ráðgeving um internetspurningar
- at stovna konti til viðskiftafólk
- at menna kundatænastuna
- at menna nýggjar internettænastur
- at røkja postambætarar

Tað er eitt krav, at tú:

- hevur kunnleika til internet uppringt samband
- hevur kunnleika til internet postskipanina

Tað er ein fyrimunur, um tú:

- í stóran mun dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ert nærlagdur/nærløgd
- hevur kunnleika og royndir innan TCP/IP og Internet
- hevur kunnleika til Windows-NT
- hevur kunnleika til og royndir við Unix
- ert fyrikomandi og dugir væl at tosa við viðskiftafólk
- hevur hugsjónir um Internet
- dugir enskt

Vit rokna við, at tú hevur EDV-útbúgving, tekniska útbúgving ella møguliga aðra viðkomandi útbúgving.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Páll Wiberg Joensen á tlf. 30 30 30

Umsóknir við hjáløgdum prógvum og CV skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mikudagin 16. august 2000.

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697